# SEV-stjórin leggur kongin



*Klæmint Weihe er framvegis stjóri í SEV og formaður í Vágatunlinum, men sessurin í Norðoyatunlinum glapp í vikuskiftinum*

**Fráboðaða kanningin av leiklutinum hjá Klæmint Weihe verður slept. Afturfyri leggur hann nevndarsessin frá sær í Norðoyatunlinum**

SEV-STRÍÐ
*Ingi Rasmussen*

Stjórin í SEV, Klæmint Weihe, skal leggja sessin sum formaður í P/F Norðoyatunlinum frá sær. Tað er niðurstøðan, eftir at stýrið fyri SEV fríggjadagin fundaðist í fimm tímar um lagnuna hjá Klæmint Weihe, sum hevur verið í hørðum andróðri fyri sín dupultleiklut í Vágatunlinum.

Umframt at vera SEV-stjóri er Klæmint Weihe formaður í P/F Vágatunlinum, og tað hevur sátt iva um hansara gegni. Tá Klæmint Weihe herfyri so keypti eitt neyðstreymannlegg til Vágatunnilin fyri 600.000 krónur fyri rokningina hjá SEV, uttan at spyrja SEV-stýrið eftir, førdi tað til harðar ábreiðslur. Tær endaðu við, at Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsráðnum fyri SEV, kravdi eina løgfrøðiliga kanning av leiklutinum hjá Klæmint Weihe.

### Ongin kanning

Eftir drúgva fundin fríggjadagin er greitt, at Hans Tausen Olsen hevur slept kravinum um eina kanning, og afturfyri hevur Klæmint Weihe játtað at leggja frá sær sum formaður í P/F Norðoyatunlinum, sum er mannað við somu nevnd sum Vágatunnilin.

»Umboðsnevndarformaðurin, stýrið og stjóri eru samd um, at eftir umstøðunum og fyri at fáa enda á hesum fastlæsta máli, leggur Klæmint Weihe, stjóri, nevndarsessin í P/F Norðoyatunlinum frá sær.

Eisini samtykti stýrið at seta í verk eina endurskoðan av innanhýsis mannagongdum hjá SEV«, siga partarnir í semjuni

Tað líkist einum taktiskum spæli, har allir partar varðveita skinnið á nøsini.

### Forða endurtøku

Hans Tausen Olsen, umboðsráðsformaður, sigur seg vera nøgdan við semjuna, hóast tað var hann, sum kravdi eina óvilduga løgfrøðiliga kanning av málinum.

Vit spurdu hann, um onki er at kanna longur.

– Tað, sum varð gjørt, er rættað. SEV svíður ikki fyri annleggið, tí tað hevur Vágatunnilin keypt. Tað, sum vit nú hava gjørt, forðar fyri, at sama søgan endurtekur seg, sigur Hans Tausen Olsen.

Hóast Klæmint Weihe fer frá í Norðoyatunlinum, heldur hann fyribils fram í nevndini fyri Vágatunnilin.

– Vágatunnilin letur upp 10. desember, og tá er tað arbeiðið yvirstaðið, sigur Hans Tausen Olsen.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa orðið á Klæmint Weihe, stjóra, sum er burturstaddur.

## SEV gloppar dyrnar

**Mannagongdir skulu endurskoðast og farið verður undir at gera SEV meiri opið fyri almenningum**

GJØGNUMSKYGNI
*Ingi Rasmussen*

SEV hevur verið sum eitt kongaríkið, har almenningurin hevur havt lítið innlit í, hvat gongur fyri seg handan leiktjøldini.

Tað hevur leingi verið almenna fatanin og størsta kritikkpunktið ímóti SEV.

Í semjuni, sum varð gjørd milllum umboðsráðið, stýrið og stjóran fyri SEV um vikuskiftið, verður farið undir at draga gardinurnar frá í hesum stóra felagsskapi, sum kommunurnar eiga.

– SEV hevur verið ov afturlatið, og tað er alneyðugt, at tað verður meira opið. Við semjuni fara vit undir at fáa meira gjøgnumskygnið í SEV, sigur Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsráðnum, sum er hægsti myndugleiki í SEV.

Hann vil kortini ikki útgreinað, hvat liggur í orðingini »at seta í verk eina endurskoðan av innanhýsis mannagongdum hjá SEV«, sum tað eitur í semjuni.

# Stjørnuskot til tey bjartskygdu

**Tey morgunfrísku kunnu týsmorgunin 19. november klokkan 04 síggja óvanliga nógv stjørnuskot. Um føroyska veðrið loyvir tí.**

STJØRNUSKOT
*Ingi Rasmussen*

10 stjørnuskot um minuttin.

Tað er møguleiki fyri at síggja, um tú ert tíðliga á fótum týsmorgunin.

Astronomarnir siga, at jørðin krossar leiðina hjá kometini Temple-Tuttle um 4-tíðina týsmorgunin, og hendan komet er upphavið til eitt satt fýrverk av meteorum.

Stjørnuskot eru smáir bitlar, sum brenna upp, tá teir við stórari ferð raka atmosferuna og fáa luftina at gløða. Og tað er hetta hugtakið, sum ger serliga nógv um seg týsdagin.

Serfrøðingarnir siga, at helst ganga 100 ár, áðrenn vit aftur sleppa at síggja so nógv stjørnuskot.

Treytin fyri at síggja nakað sum helst, er kortini, at tað er nøkulunda skýfrítt og ongin mjørki. Petur Skeel veðurfrøðingur sigur, at mjørkin ikki verður nakar trupulleiki, men meira ivasamt er við skýggjunum. Tó hendir tað ofta um náttina, at skýggini fjara burtur, tá tey nærkast jørðini.

So tey, sum eru bjartskygd, og ikki vilja bíða í 100 ár, kunnu seta vekjaran at ringja um fýra tíðina í nátt.



# Eingin keypir fisk í Havn

**- Ætlanin er at skipa so fyri, at ráfiskur aftur kann landast í Havn, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í Føroya Fiskavirking**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*


*Tá ið ráfiskamóttøkan á gamla Bacalao er umbygd og góðkend sum landingarmiðstøð, verður høgligari hjá útróðrarmonnum í Suðurstreymi at sleppa av við fiskin.*

Herfyri ringdi ein lesari til Sosialin og fýltist á, at ikki slepst av við fisk í Havn.

Hyggja vit út í bátahylin á Argjum, oman í Vágsbotn og oman á Bursatanga, síggja vit, at bátatalið í Tórshavnar kommunu er rættiliga stórt - og nógv tað størsta í landinum.

Fægstu av hesum bátum munnu tó vera ætlaðir til útróður burtur av, men tað er altíð soleiðis, at onkur bátur loysir av og á og fer ein snellu-, snøris-ella línutúr. Fæst fiskur ein slíkan dag, og meira verður drigið enn til húsnýtslu, hevði tað verið hent hjá monnum at kunnað sett nakrar fiskar á vektina.

Onkur selir á marknaðinum í Vágsbotni, men tað er avmarkað, hvussu nógv kann sleppast av við her.

Menn halda, at tað hevði verið hent, um virkið hjá Fiskavirking í Havn keypti útróðrarfisk.

### Ikki góðkend

Meinhard Jacobsen, stjóri í Føroya Fiskavirking, sigur, at virkið í Havn kann ikki taka ímóti ráfiski um bryggjukantin sum er, tí virkið er ikki góðkent sum landingarmiðstøð.

- Vit hava nakrar landingarmiðstøðir í Føroyum, og tað eru bert hesar, sum kunnu landa fisk um bryggjukantin.

Hann vísir á, at arbeitt verður við at fáa virkið í Havn góðkent sum landingarmiðstøð aftur, men til tess mugu gerast nakrar broytingar, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan krevur.

- Ætlanin er at nýta gomlu móttøkuhølini á virkinum til endamálið við ymiskum broytingum, sigur Meinhard Jacobsen.

Nær móttøkan í Havn verður umbygd og góðkent sum landingarmiðstøð aftur, er eitt sindur ilt at siga.

Stytsti vegurin hjá útróðrarbátunum í Suðurstreymi at sleppa av við fiskin er at sigla inn á Toftir, har fiskurin verður landaður og seldur á gólvinum.

# Maskinurnar til smáfisk eru keyptar

**Ætlanin hjá Føroya Fiskavirking at virka smáfisk í Álakeri er broytt. Maskinurnar, sum eru keyptar til endamálið, verða helst settar upp á gamla Bacalao, og síðan verður uppsagingin av blokki og annað góðskingarvirksemi í Álakeri**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*


*Upprunaliga ætlaði Føroya Fiskavirking at virka smáfisk á virkinum í Álakeri, men nú er hendan ætlan broytt.*
*- Við at flyta góðskingarpartin út í Álaker, verður virksemið har úti meira støðugt, sigur Meinhard Jacobsen.*

Í vár segði stjórin í Føroya Fiskavirking, Meinhard Jacobsen, at felagið ætlar at gera meira við tann smáa fiskin, sum í stóran mun endar á útlendska marknaðinum, óvirkaður.

Tá ið Bjarti Mohr niðurlegði sítt virksemi á virkinum í Álakeri, sum Havnar Arbeiðsmannafelag eigur, varð avtala gjørd við Fiskavirking um, at FF skuldi yvirtaka leigumálið og halda fram í bygninginum.

Meinhard Jacobsen segði, at ætlanin hjá Fiskavirking var at keypa maskinur inn á virkið og fara at arbeiða smáfisk í hølunum.

Men hesar ætlanir eru nú broyttar.

### Maskinurnar keyptar

- Vit hava keypt allar maskinurnar, sum vit skulu hava til virking av smáfiski, men ætlanin er nú broytt.

Broytingin er, sigur Meinhard Jacobsen, at nýggju maskinurnar væntandi verða settar uppá gamla Bacalao, og síðan fer Fiskavirking at flyta ein part av teirri framleiðslu, sum er á gamla virkinum, út í Álaker.

- Vit fara ætlandi í Álaker við góðskingini, sum er á gamla virkinum, tí vit meta, at tað fer at verða betur fyri virksemið.

Meinhard sigur, at ætlanin er at flyta uppsagingina av blokki og annað góðskingarvirksemi út í Álaker.

Á virkinum í Havn arbeiðir Fiskavirking serliga frystan russarafisk, men virkið sagar eisini blokk og góðskar fiskavørur fyri onnur virkir hjá felagnum. Hesar maskinurnar skulu so flytast út í Álaker.

- Í løtuni eru vit í holt við at finna út av, hvussu best er at gera.

Spurdur, um virksemið verður størri, tá ið felagið nú eisini fer at skera og góðska smáfisk, sigur Meinhard.

- Ja, samlaða virksemið verður størri, men brúk verður ikki fyri nógvum fólki aftrat, tí maskinurnar koma at taka sær av einum stórum parti av økta virkseminum.

Hann sigur, at nú góðskingin verður flutt út í Álaker, verður arbeitt við at fáa frystaríið har úti uppaftur at koyra. Sum skilst, hevur tað ikki verið í drift leingi.

### Pinbone

Meinhard sigur, at vøran, sum ætlandi verður framleidd burtur úr smáa fiskinum, verður 5 pund, nevnd "pinbone".

- Hetta eru heil fløk, har kílin ikki er skorin burtur. Fløkini eru so smá, at tað loysir seg ikki at skera kílan burtur, sigur hann.

Stjórin í Føroya Fiskavirking sigur, at tað er serliga í ávísum tíðarskeiðum, at nógvur smáfiskur kemur uppá land, og tí kann roknast við, at virksemið verður skiftandi.

- Men við at flyta góðskingarpartin út í Álaker, verður virksemið har úti meira støðugt, sigur stjórin í Føroya Fiskavirking at enda.

# Fiskavirking aftur yvirskot í ár

**- Men enn er ov tíðliga at siga, hvussu árið hevur vignast, sigur stjórin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað vóru ikki smávegis rósandi orð, ið bæði fyrrverandi og núverandi formaðurin í Framtaksgrunninum, Sverri Hansen og Niels Winther Poulsen, høvdu at bera leiðsluni í Føroya Fiskavirking herfyri, tá ið kjakið um privatisering av fyritøkuni gekk uppá tað "heitasta".

Og tað skerst ikki burtur, at tað hevur gingið væl hjá felagnum, hóast samlaða virksemið er stórt, og nógvar íløgur eru gjørdar kring landið, tí virkini vóru so niðurslitin.


*Meinhard Jacobsen, stjóri í Føroya Fiskavirking:*
*- Eg haldi, hetta árið hevur verið brúkiligt - um enn ikki líka so gott sum í fjør, tá ið vit høvdu eitt yvirskot uppá 18,5 milj. krónur.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Aftur yvirskot

Meinhard Jacobsen, stjóri í Føroya Fiskavirking, sigur, at árið í ár hevur roynst hampiliga væl hjá felagnum.

- Jú, eg haldi, at hetta árið hevur verið brúkiligt, sigur hann.

Meinhard vil tó ikki leggja høvdið á blokkin og siga, hvussu gongdin ítøkiliga hevur verið.

- Eg haldi, tað er ov tíðliga at siga nakað enn.

Í fjør hevði felagið eitt yvirskot uppá 18,5 milj. krónur, men hóast hetta árið er brúkiligt, sum Meinhard Jacobsen tekur til, væntar hann kortini ikki, at yvirskotið verður líka stórt sum seinasta ár.